# STUÐULSSKIPAN FYRI SKÚLAFÓTBÓLT

## Aðalmál

At fáa skipað fótbóltsvirksemi og fótbólt í dagstovnar, frítíðarskúlar, fólkaskúlar og líknandi almennar stovnar.

**Grundarlag handan stuðulsskipanina**

Stuðulskipanin er sett í verk saman við UEFA Football-in-Schools og skal lúka treytirnar í Hattrick IV reglugerðini hjá UEFA. Tiltøk og tilboð skulu tískil vera í tráð við virðini í UEFA Grassroots Charter um barna- og breiddarfótbólt. Hetta merkir:

- At endamálið er at skapa heilsufremjandi tilboð/tiltøk bæði kropsliga og kensluliga, har fótbóltur verður nýttur sum eitt sosialt og pedagogiskt amboð. Tilboðini/tiltøkini skapa trivnað og menna virðir, lívsførleikar og jalig sambond millum leikarar.
- At skipaða fótbóltsvirksemið skal leggja dent á luttøku, inklusjón og persónliga menning. Tiltøk og kappingar, har endamálið er at vinna og vera best, verða ikki stuðlað.
- At lærarar, námsfrøðingar, hjálparfólk og onnur, ið skipa virksemið, verða førleikament innan fótbóltsvenjing og kunnu skapa trygg, inkluderandi og stuttlig fótbóltsumhvørvi, umframt at veita dygdargóðar og læruríkar fótbóltsundirvísingar.
- At tilboð og tiltøk eisini verða boðin til børn og ung, ið ikki longu spæla, og soleiðis geva øllum møguleika at spæla fótbólt regluliga.
- At tilboðini kunnu menna leiðir inn í fótbóltsfeløgini

## Hvør kann søkja?

Skúlar, frítíðarskúlar, dagstovnar kunnu søkja um stuðul, eins og føroysku fótbóltsfeløgini kunnu søkja í samstarv við ein av áðurnevndu stovnum.
Hvat kann søkjast um?

- Einstøk tiltøk ella útgerð.
  Dømi: Einstakar kappingar/stevnur ella tiltøk, ið lúka treytirnar omanfyri.
- Regluligt virksemi.
  Dømi: Fótbóltsbreyt, fótbóltur sum vallærugrein ella líknandi

# STUÐULSSKIPAN FYRI SKÚLAFÓTBÓLT

## Treytir

**Einstøk tiltøk ella útgerð**

- FSF ynskir at tiltøkini eru opin fyri øllum og at fyriskiparir kýta seg til at geva øllum eina góða uppliving. Onkuntíð tænir tað endamálinum at deila børnini upp í t.d. roynd og óroynd, gentur og dreingir ella á annan hátt. Tá hetta verður mett at vera best hóskandi, er týdningarmikið, at tilboðini hava eins høga raðfesting.
- Tiltøk kunnu vera til ávísan aldursbólk, flokk ella deild.
- Umsóknin skal stutt lýsa endamálið við tiltakinum, væntað luttakaratal og útgreining av kostnaðarmeting. Eftir tiltakið skal stutt samanumtøka sendast inn við í minsta lagi tveimum myndum.

**Regluligt virksemi**

- Um talan er um stuðul til ítróttabreyt, er treytin at minst ein fjórðingur av virkseminum er fótbóltur
- Tilboð skulu í útgangsstøði vera fyri bæði kyn, men gagnligt kann vera at býta upp
- Samanumtøka, tá skúlaárið er liðugt – tal av luttakarum, kynsbýti og tal av venjingum
- Rokningar/kvittanir fyri útgerð
- Fólk við fótbóltsvenjararoyndum hava ábyrgd og standa fyri venjingunum
- Ábyrgdarpersónur, sum samskiftir við FSF

## Umsóknarfreist

Umsóknarfreistin til einstøk tiltøk er leypandi, tó í minsta lagi 14 dagar áðrenn tiltakið verður hildið. Mesta upphædd, ið verður latin til eitt einstakt tiltak, er kr. 6.000,-

Umsóknarfreistin til regluligt virksemi er 14. februar, og svar uppá umsóknina verður givið 28. februar.

Umsóknin skal innihalda: endamál við tiltakinum, væntað luttakaratal og útgreining av kostnaðarmeting.

Til regluligt virksemi rindar FSF stuðulin út tvær ferðir í skúlaárinum – fyrru ferð 1. oktober og seinnu ferð 1. mars.